LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 152/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Aksel V. Johannesen, løgtingsmanni, um koppseting**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Heldur løgmaður, at tað ber til at hava ein landsstýrismann, sum gongur ímóti tilmælunum frá heilsumyndugleikanum og landsstýrinum um at lata seg koppseta?
2. Heldur løgmaður, at útmeldingin hjá landsstýrismanninum, Jenisi av Rana, kann fáa óhepnar fylgjur fyri koppsetingartilgongdina?

**Svar:**

**Til 1.** Sambært Stýrisskipan Føroya fyrisita landsstýrisfólkini hvør síni málsøki. Í stuttum eiga landsstýrisfólk at halda seg til síni málsøki.

Eg haldi, tað er ein óskikkur at úttala seg alment um málsøki hjá øðrum landsstýrisfólkum. Tað er heldur ikki skilagott, at landsstýrisfólk fara út alment við síni persónligu áskoðan, tá ið hetta gongur ímóti stevinum hjá landsstýrinum. Slíkar útsagnir órógva tað politiska samstarvið og máar trúvirðið undir arbeiðinum hjá landsstýrinum.

**Til 2.** Tað er ov tíðliga at gera eina endaliga niðurstøðu, um útsagnirnar hjá landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum hava ella fara at fáa óhepnar avleiðingar á koppsetingargongdina frameftir.

Sjúkrahúsverkið hevur fylgt við, hvussu nógv fólk hava bílagt sær tíð til at lata seg koppseta, síðani bíleggingarskipanin lat upp aftur herfyri. Her er eingin broyting at hóma, og ongar tíðir eru tøkar í løtuni. Sjúkrahúsverkið hevur eisini verið í samband við tey, ið koppseta, fyri at fregnast, um fleiri fólk avlýsa sína tíð ella als ikki møta upp. Heldur ikki her er nøkur broyting.

Í Tinganesi, 2. juni 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður